# Ketta og mús

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Eitt stuttligt spæl, sum kann spælast allastaðni, har pláss er at gera ein ring við luttakarunum.**

Ein av luttakarunum verður valdur til mús og ein til kettu.

Hinir luttakararnir leiðast og gera ein ring.

Tá spælið byrjar, skal músin vera inni í ringinum, meðan kettan er uttanfyri.

Kettan skal síðani royna at sleppa eftir músini og fanga hana. Tey sum eru í ringinum skula forða kettuni at sleppa eftir músini við, at halda armarnar og seg sjálvan tætt saman, so kettan ikki sleppur gjøgnum ringin. Sleppur kettan inn, kann músin verða slept útum, meðan kettan verður hildin innanfyri.

Spælið endar, tá kettan hevur fangað músina.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo